# Próvtøkukrøv til masterritgerð í heilsuvísindum

## Endamál

Endamálið við masterritgerðini er, at lesandi mennir og vísir førleika sjálvstøðugt at nýta ástøði og háttaløg, sum lesandi hevur nomið sær í masterútbúgvingini í heilsuvísindum, við at fremja í verki kanning av einum sjálvvaldum spurdómi innan heilsuvísindum, sum hevur bæði fakligan og samfelagsligan týdning.

## Karmar

Próvtøkan er ein skrivlig verkætlan við munnligari próvtøku. Skrivliga verkætlanin kann eftir egnum vali verða skrivað sum ein ritgerð ella ein vísindalig grein.

Skrivliga verkætlanin skal vera á donskum ella enskum.

Skrivliga verkætlanin verður skrivað einsæris ella í bólki, tó í mesta lagi 3 lesandi kunnu vera í hvørjum bólki.

Innsavnan og handfaring av dáta til verkætlanina skal gerast sambært galdandi reglugerð, sí vegleiðingar oa. viðkomandi tilfar á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum og galdandi leiðreglur hjá setrinum.

Skrivliga verkætlanin verður vard við munnligari einstaklinga próvhoyring. Munnliga próvhoyringin er á føroyskum, donskum ella enskum eftir avtalu við próvhoyrara.

Skrivliga verkætlanin skal latast inn umvegis talgildu próvtøkuskipanina wiseflow kl.12 á middegi til ásettu dagfesting, ið verður fráboðað frá útbúgvingarleiðara. Harumframt skulu 3 eintøk latast inn á skrivstovuna innan kl. 15.00 eftirfylgjandi dag (til Sylviu Zachariassen, skrivara á deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi).

Verður skrivliga verkætlanin ikki latin inn rættstundis, verður próvtøkan mett ikki staðin og telur sum fyrstu próvtøkuroynd.

Munnliga próvtøkan verður umleið 3 vikur eftir innlating av skrivligu verkætlanini (dagfesting verður ásett av útbúgvingarleiðara). Møtir lesandi ikki rættstundis til munnligu próvtøkuna, verður próvtøkan mett ikki staðin og telur sum fyrstu próvtøkuroynd.

Listi við tíðarfesting av munnligu próvtøkuni verður kunngjørdur á skeiðsskipanina Moodle í seinasta lagi tvær vikur fyri próvtøkuna.

## Skrivlig verkætlan: ritgerð

Verður skrivliga verkætlanin skrivað sum ritgerð kann henda í mesta lagi vera 144.000 tekn til longdar við millumrúmi, svarandi til 60 síður (undantikið forsíðu, innihaldsyvirlit, samandrátt og heiti á føroyskum, donskum og enskum, bókmentalista og møgulig fylgiskjøl).

Um ritgerðin verður skrivað av bólki, verða í mesta lagi 12.000 tekn við millumrúmi, svarandi til 5 síður, løgd afturat fyri hvønn persón. Ritgerðin kann tó í mesta lagi fata um 168.000 tekn við millumrúmi, svarandi til 70 síður.

Ritgerðin skal skrivast sambært *Ritstjórnan av uppgávum fyri Deildina fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi*.

## Krøv til serritgerðina

Lesandi skal, við støði í pensum fyri útbúgvingina og sjálvvaldum bókmentalista:

- greiða frá einum sjálvvaldum spurdómi á ein skipaðan hátt og argumentera fyri, hví spurdómurin er bæði fakliga og samfelagsliga relevantur at kanna
- fremja skipaða leiting og reflektera yvir leitiúrslitini í mun til spurdómsøkið
- avmarka spurdómin, gera eina spurdómsorðing og soleiðis seta egnu kanning inn í ein vísindaligan kontekst
- lýsa og grundgeva fyri vali av empiriskum ella teoretiskum tilfari, vísindaligari tilgongd og háttalagi
- nágreiniliga lýsa kanningargongdina
- greiða frá úrslit(-um)
- kritiskt meta um háttalag og úrslit í einum kjaki við nýtslu av týðandi keldum
- orða niðurstøðu og perspektivera við støði í samlaðari meting av egnum avriki
- skriva ein stuttan og fokuseraðan samandrátt á føroyskum, donskum og enskum, sum í mesta lagi er eina síðu, te. 2400 tekin við millumrúmi. Í samband við føroyska
  og enska samandráttin skal heitið á ritgerðini vera á føroyskum og enskum

## Skrivlig verkætlan: vísindalig grein

Verður skrivliga verkætlanin skrivað sum vísindalig grein skal lesandi skriva empiriska, ástøðiliga grein ella eitt review, sum metist at vera eitt næstan liðugt uppkast til grein.

Lesandi velur tað tíðarritið, har greinin skal gevast út. Greinin skal lúka tey krøv, sum tað ávísa tíðarritið setur sum standard. Kelduávísingar og keldulisti kunnu sostatt skrivast eftir krøvum hjá valda tíðarritinum, eisini hóast hesi eru øðrvísi enn tilskilað verður í *Ritstjórnan av uppgávum fyri Sjúkrarøktarfrøðideildina*.

Afturat greinini skal lesandi skriva eitt appendiks í tilknýti til greinina ella hennara evnisøki, t.d. ein víðkað ástøðilig frágreiðing, eitt meira umfatandi review av (spurdóms)økinum ella kjak um háttaløg. Appendiksið skal vera 10-40 síður til støddar og valið av evni/evnum til appendiks skal verða grundað í tekstinum.

## Krøv til vísindaliga grein

Vísindaliga greinin skal lúka somu krøv sum ritgerð. Tó verða allir partar væntandi minni í vavi, av tí at flestu vísindaligu tíðarrit hava strong krøv til longd á greinatekstinum.

Lesandi skal, við støði í pensum fyri útbúgvingina og sjálvvaldum bókmentalista:

- greiða frá einum sjálvvaldum spurdómi á ein skipaðan hátt og argumentera fyri, hví spurdómurin er bæði fakliga og samfelagsliga relevantur at kanna
- fremja skipaða leiting og reflektera yvir leitiúrslitini í mun til spurdómsøkið
- avmarka spurdómin, gera eina spurdómsorðing og soleiðis seta egnu kanning inn í ein vísindaligan kontekst
- lýsa og grundgeva fyri vali av empiriskum tilfari, vísindaligari tilgongd og háttalagi
- nágreiniliga lýsa kanningargongdina
- greiða frá úrslit(-um)
- kritiskt meta um háttalag og úrslit í einum kjaki við nýtslu av týðandi keldum
- orða niðurstøðu og perspektivera við støði í samlaðari meting av egnum avriki
- skriva ein stuttan og fokuseraðan samandrátt á føroyskum, donskum og enskum, sum í mesta lagi er eina síðu, te. 2400 tekin við millumrúmi. Í samband við føroyska og enska samandráttin skal heitið á ritgerðini vera á føroyskum og enskum

Aftaná munnligu próvtøkuna kann lesandi í samstarvi við vegleiðara ella onnur menna greinina og senda hana til útgávu.

## Vegleiðing

8 vegleiðingar eru í boði.

## Munnlig próvtøka

Próvtøkutíðin er 60 minuttir íroknað meting. Lesandi hevur høvi at brúka 10 minuttir til egna framløgu, 15 minuttir eru til meting. Lesandi er ikki til staðar tá mett verður.

Próvhoyringin fevnir um spurningar og fakligan dialog millum lesandi og próvhoyrara. Próvdómarin hevur høvi at seta útgreinandi spurningar.

Spurningar verða settir við grundarlagi í skrivligu verkætlanini og bókmentaávísingunum. Lesandi skal gjølla lýsa ástøðiligu vitanina, sum er nýtt í skrivligu verkætlanini, og skal greiða frá serstaka innlitinum, sum hon hevur ognað sær, meðan arbeitt hevur verið við verkætlanini.
Lesandi skal vísa sjálvstøði, umfatandi fakligt innlit og kritiska støðutakan í próvhoyringini.

## Meting

Eitt samlað próvtal verður givið fyri skrivligu verkætlanina og avrikið við munnligu próvtøkuna útfrá krøvum og kørmum fyri próvtøkuna og læruúrtøkum fyri masterritgerð í heilsuvísindum.

Mett verður eftir galdandi próvtalsstiga av uttanhýsis próvdómara og próvhoyrara. Uttanhýsis próvdómarin er tilnevndur av Mentamálaráðnum eftir galdandi reglum. Vegleiðarin er próvhoyrari.

Próvtalið 2 krevst fyri at standa.

## Sjúkraprótøka

Boðað Deildini fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi frá beinanvegin, um tú ikki kanst luttaka í próvtøkuni. Sjúka skal skjalfestast við læknaváttan og vera galdandi fyri sjálvan próvtøkudagin. Hon skal latast inn á skrivstovuna skjótast gjørligt og í seinasta lagi eina viku eftir próvtøkudagin.

Deildin fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi ásetur tíðina fyri sjúkraprótøku. Krøvini fyri vanligu próvtøkuna eru galdandi fyri sjúkraprótøkuna.

## Endurprótøka

Deildin fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi ásetur tíðina fyri endurprótøku. Krøvini fyri vanligu próvtøkuna eru galdandi fyri endurprótøkuna.

## Felags treytir

Próvtøkutreytirnar eru staðfestar í:

Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012

Kunngerð nr. 73 frá 31. mai 2013 um próvtalsstiga og døming, sum broytt við kunngerð nr. 124 frá 13. november 2013

## Kæruviðurskifti

Rætturin at kæra er staðfestur í

Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, kap. 6a

Grundgivin og skrivlig kæra verður stílað til dekanin á Deildini fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi og latin inn á skrivstovuna á Deildini fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi í seinasta lagi 2 vikur aftaná, at dømingin er kunngjørd.